# eftir tunlinum






*- Eg dugi ikki at skilja, hví vit skulu bíða so leingi eftir einum tunli. Oyggin kann doyggja út, meðan vit bíða, sigur Torbjørn Jacobsen, sum her er í ferð við at mála bát sín í Skopun*
Mynd: Jens K r. Vang

> *Vit vilja hava ein tunnil, soleiðis at okkara oyggj kann verða bundin saman við hinar oyggjarnar*
> (Torbjørn Jacobsen, Skopun)

> *Tað næsta er sjálvandi tað, at vit fáa samband við Suðuroynna, og tey við okkum*
> (Torbjørn Jacobsen, Skopun)

## Norður búseting í Skopun

Torbjørn Jacobsen sær fyri sær mangar fyrimunir við einum tunli til meginøkið.

Hetta verður ein stórur fyrimunur fyri sandoyingar, men eisini fyri onnur heldur hann:

- Bæði eysturoyingar og fólk í Streymoy fara at fáa gagn av hesum.

Eitt dømi um hetta er samrøðan, sum vit høvdu fyrr í vikuni við eini hjúni - hann úr Skopun og hon úr Søldarfirði - sum høvdu bygt sær egin hús í nýggju útstykkingini í Skopun.

Torbjørn er vitandi um, at onnur fólk - eisini norðanfjørðs - hava fingið sær grundøki í Sandoynni.

- Far bara norður í bygdina, so síggja tit, hvat hendir. Fólk ætla at byggja her, uppá tað at tunnilin kemur!



Mynd: Jens Kr. Vang



*- Hóast Magni er betri lærdur enn eg, so dugi eg í øllum førum at síggja, at skal fólkið trívast í oynni er neyðugt við einum tunli, sigur Torbjørn*
Mynd: Jens Kr. Vang